Vikuskiftis Sosialurin





# Leys størv

### Klinikkassistentur til Tannlæknastovuna

Eitt parttíðarstarv sum klinikkassistentur á Tannlæknastovu Tórshavnar kommunu er leyst at søkja.

Setanarviðurskifti: Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsókn við avritum av skjølum, ið kunnu hava týdning, verður at senda Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 10. november 2006.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sigrid Arge, tannlæknastjóra, tlf. 302525, ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

### KT-starvsfólk til KT-deildina

Søkt verður eftir einum KT-starvsfólki til KT-deildina skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

Setanarviðurskifti: Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 7. november 2006, kl 12. Viðmerkið umsóknina „KT-starvsfólk“.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Ellingsgaard (ingi@torshavn.fo), leiðara á KT-deildini, ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

### Pedagogur til Dagstovnin Sólareygað

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja skjótast gjørligt. Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsókn saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Dagstovninum Sólareygað, Sundsvegur 23, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. november 2006.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mirjam Johannesen, stovnsleiðara, tlf. 302437 ella 257150.

### Køksfólk til Dagstovnin á Hamrinum

Vit sóknast eftir køksfólki at arbeiða 15 tímar um vikuna.

Møguliga ert tú: Tilkomin, givin á tí pulserandi arbeiðsmarknaðinum, men hevur kortini hug at starvast úti nakrar tímar um vikuna.

Vit ynskja: t. d. eina ommu, sum dámar væl at gera mat, og sum við m.a bakstri hugnar um í køkinum. Tú skal vera góð við børn og dáma at práta við tey, tá tey vitja teg í køkinum.

Tú skal gera millummála til 66 fitt børn og døgurða ein dag um vikuna.

Er hetta nakað fyri teg, kanst tú seta teg í samband við Elisabeth Henriksen, leiðara, ella Malina Erlingsson, varaleiðara, á tlf. 322003 ella 225784.

Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn saman við møguligum viðmælum skal vera Dagstovninum á Hamrinum, Glyvursvegur, 160 Argir, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 10. november 2006.

### Køksfólk til Býlingshúsinum á Flat

Søkt verður eftir einum køksfólki at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja skjótast gjørligt. Tann, ið settur verður, kemur eisini at arbeiða nakrar tímar sum hjálparfólk inni á stovninum.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum á Flat, Per Mohrsvegur 11, 188 Hoyvík, í hendi innan mánadagin 6. november 2006.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jensinu Andreassen, stovnsleiðara, tlf. 318371.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir tveimum fólkum at vaska okkara høli á Debesartrøð og á Falkavegi í Tórshavn.

Annað vaskifólkið verður at meta sum ábyrgdarhavandi vaskifólkið. Í umsóknini skal upplýsast, hvat av størvunum søkt verður um.

**Arbeiðsuppgávurnar**
Hølini skulu gerast rein eftir galdandi vaskiskráum. Hølini á Debesartrøð eru kanningarstovur, skrivstovur, kantina o.a., sum hoyrir einum slíkum bygningi til, meðan hølini á Falkavegi fyri tað mesta eru skrivstovur.

Vaskast skal dagliga í hølunum á Debesartrøð og 3 ferðir um vikuna í hølunum á Falkavegi.

Íroknað vaskiarbeiðið er bílegging av útgerð, sum verður nýtt til vaskingina.

**Krøv til útbúgving og førleika**
Tað eru eingi formlig krøv til útbúgving, men hevur tú t.d. prógv frá fólka- og/ella miðnámsskúla við góðum avriki, hevur tú ein fyrimun.

Royndir frá líknandi arbeiðsuppgávum eru ein fyrimunur, men ikki eitt krav.

Partur av vaskiarbeiðinum er fysiskt krevjandi.

Vit vænta, at tú dugir vanligu edv forritini, sosum word og outlook. Hetta tí at teldan verður eitt náttúrligt arbeiðsamboð í sambandi við bílegging av vaskiútgerð og annað.

Vit sóknast eftir vaskifólki við áræði, framfýsni og dirvi at náa settum málum.

**Vit vænta**
- at vaskiskráin verður fylgd hvønn dag
- at tú, tá ið serligar umstøður gera seg galdandi, hevur møguleika at átaka tær eyka vaskiarbeiði
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú hevur góð evni at samskifta við onnur

Tá ið tiltøk eru av stovnsligum slag, vænta vit, at tú hevur møguleika at luttaka.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er tímalønt, og løn verður útgoldin útfrá nýttari arbeiðstíð.

Fyri hvørt vaskifólk er arbeiðstíðin normerað til 2,9 tímar um dagin, ella 14,5 tímar um vikuna. Teir dagar, tá ið vaskað verður bæði á Debesartrøð og Falkavegi, er flutningur millum bæði støðini á 10 minuttir íroknað arbeiðstíðina.

Vaskingin fer fram eftir kl. 18 á kvøldi.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið, sí www.lnd.fo. Lønin liggur um 7.500 kr. um mánaðin.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvi og viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 14. november 2006.

Bæði størvini verða at seta sum skjótast.

Lýsingin er eisini at síggja á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni,www.hfs.fo, har tú eisini kanst kunna teg um vaskiskráirnar.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bárð Enni, stjóra, tel. 35 64 00.

## Sel mær eitt grundstykki

**í Suðureysturoy ella Suðurstreymoy**

**300 frm. ella størri**

**Tú fær rætta prísin fyri rætta grundstykkið**

**Tel. 21 77 05**

**Lesið Sosialin**